venda okkum til Hann og hyggja eftir Honum – og ikki heiminum – hava eina livandi tætta kærleiksrelatión við Hann, so vit kunnu vera heiminum ljós

1. Jóh. 4:18: *Ótti er ikki í kærleikanum; nei, hin fullkomni kærleiki rekur óttan út. Tí ótti hevur straffina í sær, og tann, sum óttast, er ikki fullkomin í kærleikanum*

– týdningurin av sanna samleikanum, so vit ikki eru bangin fyri at vísa hvørji vit eru.

– Týdningurin av sonnum relatiónum okkara millum – skriftstaðið sigur, at vit eru ein 'staður' t.v.s. vit skulu eisini lýsa saman – fleiri vit eru saman, bjartari skínur ljósið frá okkum. Tí mugu vit eisini tora at vera erlig og reel í okkara samkomufamiljurelatiónum, so ljósið í okkum kann vaksa…

Berarir av Guds nærveru – sameint í kærleikanum, sum er Gud – til at vera menniskjum ljós í myrkrinum

Nú tað nærkast til jóla síggja vit hópin av ljósketum, og saman lýsa tær upp, samstundis sum tær geva hugna; men er ein pera, sum ikki lýsir, ella hevur mist glæmuna, so hon bara ænir, ja tá tekur hon fokus, tí vit leggja meir merki til peruna, sum ikki skínur bjart, hóast allar hinar lýsa bjart.

Guds ljós í okkum er, sum omanfyri nevnt, strálandi bjart, men bera vit ótta, ótryggleika, stúran o.s.fr., so vil hetta stjala kraftina, so okkara ljós frá Honum, ikki er skínandi. Esaias profetarar í kap. 60: *Statt upp, verð ljós! Tí ljós títt er komið, og dýrd Harrans rennur upp yvir tær.* Profetorðið talar inn í okkara tíð, tí á Esaiasar døgum var Heilagi Andin ikki komin; men fyri okkum er Hann komin, og tí kunnu vit taka hesa heilsan til okkara: Statt upp og verð ljós. Ljósið er ikki hvussu væl tú skikkar tær, men hvussu nógv Heilagi Andin í tær, sleppur at lýsa. Um vit støðugt mennast í kærleika Kristusar, so fjarar stúran, ótti, ótryggleiki v.m., tí ótti er ikki í kærleikanum.

„At frygte kærligheden er at frygte livet, og de, der frygter livet, er allerede trefjerdedele døde.“ Bertrand Russel

Sálm. 34:
*5 Eg søkti HARRAN, og Hann svaraði mær og fríaði meg frá øllum, ið eg ræddist.*
*6 Tey hugdu upp til Hansara – og lýstu*[1] *av gleði, og andlit teirra rodnaðu aldri av skomm.*

Lat okkum tora at vera reel og sárbær yvir fyri hvørøðrum.

Lat okkum tora at lata streymarnar flóta úr okkara innara – ikki bara inn í sál og likam okkara – men til hvønnannan og til alt okkara dagliga umhvørvi. Lat okkum fylla okkara umhvørvi og okkara felagsskap við Hansara kærleika.

*amd*

---

[1] Radiant:
1 ljómandi, geislandi, glógvandi, glitrandi
2 (um fólk) himmalglaður, sum strálar (av gleði)
dk: strålende



Filadelfia
„Himmal á jørð“

# Latið okkum **skína**

Nú vit aftur ganga myrkastu tíð á árinum ímøti, er upplagt eisini at hugleiða um týdningin av ljósinum – bilarnir mugu hava lyktirnar tendraðar og vit mugu tendra ljósini fyri at síggja nakað, bæði morgun og kvøld – og skjótt næstan alt samdøgrið. Vit tendra eisini nógvar ljósperur og livandi ljós hesa árstíð fyri at hugna um og fáa hita.



Í hesum konteksti gerast orð Jesusar í Matt. 5:14-16 viðkomandi:

*Tit eru ljós heimsins; staður, ið stendur á fjalli, fjalist ikki. Tey tendra heldur ikki ljós og seta tað undir skeppumálið – nei, í ljósastakan; so lýsir tað øllum í húsinum. Latið soleiðis ljós tykkara lýsa menniskjum, so tey kunnu síggja góðu verk tykkara og æra Faðir tykkara, sum er í Himli!*

Um vit hyggja eftir øllum tí, sum gongur fyri seg í heiminum í dag, og øllum teimum sterku meiningunum, ið gera seg galdandi á so nógvum økjum, kann vera trupult at vita hvat vit skulu siga ella hvussu vit skulu uppføra okkum sum einstaklingar og samkoma fyri at vera heiminum ljós.

Tey góðu tíðindini eru, at vit eru ikki kallað til at hava eina ávísa meining á øllum økjum (ella okkurt líknandi) ella til ávísan atburð, men til at liva og mennast andaliga saman við Gudi, fyri at kunna draga úr kelduni og verða heiminum ljós. Tað vil siga, vit skulu

# DESEMBER 2023

| | | | |
|---|---|---|---|
| Leygardagur | 2. | | **Reingerð:** Merlie og co. |
| Sunnudagur | 3. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.45 | **Morgunmøti**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Fríðbjørn og Linda<br>Ábyrgd/Leiðari: Anna<br>Lovsongsleiðari: Ingun, bólkur ØLL<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Tummas J.<br>Kaffivertar: Fríðbjørn og Linda |
| Mánadagur | 4. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Regin<br>Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Leygardagur | 9. | | **Reingerð:** Malena og co. |
| Sunnudagur | 10. | Kl. 16.00 | **Jólaveitsla**<br>Møtivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður<br>Ábyrgd/Leiðari: Conny<br>Lovsongsleiðari:<br>Uppvørpa: Ása Elisabeth<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni<br>Talari:<br>Kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður |
| Mánadagur | 11. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Regin<br>Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Leygardagur | 16. | | **Reingerð:** Anna-May og co. |
| Sunnudagur | 17. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti**<br>Møtivertar: Nora, David og Kári<br>Ábyrgd/Leiðari: Anna-May<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur ØLL<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari:<br>Kaffivertar: Nora, David og Kári |
| Mánadagur | 18. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Regin<br>Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Leygardagur | 23. | | **Reingerð:** Karin og co. |
| Jólaaftan | 24. | Kl. 16.00 | **Jólagudstænasta**<br>Møtivertar: Áshild og Eyðbjørg<br>Ábyrgd/Leiðari: Tummas J.<br>Lovsongsleiðari:<br>Uppvørpa: Ása Elisabeth<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni<br>Talari:<br>Kaffivertar: Áshild og Eyðbjørg |
| Leygardagur | 30. | | **Reingerð:** Ingun og co. |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

## *Jólaveitslan*

So eru jólini aftur í hondum og vit fyrireika jólaveitsluna, sum verður sunnudagin 10. des. kl.16.00.
Børnini luttaka við leiki og vit fáa onkran sang frá okkara fantastisku sangarum. Til eina veitslu hoyrir eisini matur, tað plagar ikki at tróta. Vit hava ein lista liggjandi á diskinum og fara at biðja fólk skriva seg upp til hvat tey vilja koma við av mati.

Barnamøtini fara í jólafrí frá 10. des og byrja aftur 7. jan.24.
Vit ynskja øllum eini góð og hugnalig jól

*Vælkomin til jólaveitslu*
*Vh Sunnudagsskúlin*

## Hugnaløta í Filadelfia

3 leygardagar hava vit havt hugnaløtu í Filadelfia, har vit hava prátað, fingið morgunmat við kaffi/te og bara verið saman. Okkara kæri Hallur hevur skipað fyri, og ætlanin er at hava tað fast eina ferð um mánaðin. Tað hevur riggað stak væl, og Hallur hevur gjørt eitt frálíkt arbeiði. Borð verða sett upp í salinum, og so er sjálvtøkuborð við morgunmati. Onkur spurdi um tað bert var fyri pensionistar, men so er ikki. Tankin, sigur Hallur, kom við umhugsni fyri teimum eldru, men síðani sá hann, at hetta kundi saktans vera fyri øll, og tí eru øll vælkomin.

Í desembur verður einki tiltak, men byrjað verður aftur í januar. Hugnaløtan er fast kl. 10.00 til umleið kl. 12.00, har øll, bæði yngri sum eldri, eru vælkomin. Vit koma at seta í kalendaran fyri januar, nær tað verður í januar.

Hallur – stóra takk fyri eitt gott tiltak, og títt hjartaliga ágrýtni.

*Tummas*